LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Vága Kommuna
Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

Tórshavn, tann 10. juli 2024
J.Nr.: LUM-16- 24/11241-22
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um vantandi svar frá Vága kommunu í sambandi við eina umbøn um innlit í egið mál

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vantandi svar frá Vága kommunu í sambandi við eina umbøn um innlit í egið mál. Vága kommuna svaraði ikki innlitsumbønini hjá klagaranum skjótast gjørligt og kunnaði heldur ikki klagaran um, nær avgerðin kundi væntast, tá ið 10 dagar vóru farnir, sambært § 16, stk. 2 í fyrisitingarlógini. Harumframt sást ikki av latna innlitinum, hvussu nógv skjøl vóru í málinum tilsamans. Í kanning hjá umboðsmanninum frá november 2023 um viðgerð av málum um alment innlit í størru kommununum minti umboðsmaðurin Vága kommunu á lógarásettu krøvini til viðgerðartíð, at játtanarskriv eiga at sýna greitt, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í málinum, og um innlit verður latið í tey øll. Umboðsmaðurin gav tí Vága kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum og mælti kommununi til at dagføra mannagongdina fyri viðgerð av innlitsumbønum.*

## 2. Málslýsing

Tann 3. mai 2024 sendi A umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "...
> Eg sendi eina innlitsumbøn til Vága kommunu tann 5. apríl 2024, men havi onki svar fingið enn.
> Fekk eitt autosvar beinanvegin.
> Tann 08. apríl fekk eg eitt móttøkusvar við journalnummari.
> Eg sendi ein rykkjara tann 22. apríl, men havi onki svar fingið enn.
> Av hesi orsøk ynski eg at klaga málið til umboðsmannin.
> Viðheft eru øll skjøl í málinum..."

Viðløgd klaguni vóru avrit av innlitsumbønini, móttøkuváttanum og áminning.

Í skjølunum sást, at klagarin, tann 5. apríl 2024, sendi Vága kommunu umbøn um innlit í egið mál.

Tann 5. apríl 2024 sendi Vága kommuna klagaranum sjálvvirkandi móttøkuváttan.

Tann 8. apríl 2024 sendi Vága kommuna klagaranum móttøkuváttan við málsnummari.

Tann 22. apríl 2024 minti klagarin Vága kommunu á málið.

Tá klagarin onki hoyrdi aftur frá Vága kommunu, sendi hann, tann 3. mai 2024, umboðsmanninum eina klagu.

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Tann 6. mai 2024 varð klagan send Vága kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi tríggjar vikur. Samstundis varð Vága kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl og skjalayvirlit í málinum.

Tann 17. mai 2024 sendi Vága kommuna umboðsmanninum frágreiðing, har millum annað stóð:

> "...
> Vága kommuna móttók 5. apríl umbøn um innlit, og varð hendan umbøn svarað 17.05.2024..."

Umbiðin skjøl og skjalayvirlit vóru ikki viðløgd frágreiðingini.

Tann 17. mai 2024 minti umboðsmaðurin Vága kommunu á at senda umbidnu skjølini og skjalayvirlitið.

Tann 27. mai 2024 sendi Vága kommuna umboðsmanninum umbidnu skjølini og skjalayvirlitið. Í skjølunum sást, at Vága kommuna, tann 17. mai 2024, svaraði innlitsumbønini hjá klagaranum í egið mál við kunning um, at trý nýggj skjøl vóru komin í málið, síðani klagarin seinast fekk latið innlit í málið.

Viðlagt svarinum var skjalayvirlit viðvíkjandi teimum skjølum í málinum hjá klagaranum, innlit varð latið í, umframt 10 skjøl í málinum.

Tann 30. mai 2024 varð frágreiðingin hjá Vága kommunu send klagaranum til møguligar viðmerkingar.

Umboðsmaðurin metti seg ikki greitt síggja í skjalayvirlitinum, hvussu nógv skjøl vóru í málinum tilsamans, og spurdi tí, tann 3. juni 2024, Vága kommunu uppfylgjandi spurningar, har millum annað stóð:

> "...
> Í skjalayvirlitinum, sum Vága kommuna hevur sent umboðsmanninum..., er ikki upplýst, hvussu nógv skjøl eru..., og um innlit er latið klagara í øll skjøl ella ikki.
> Umboðsmaðurin ynskir tí at fáa skjalayvirlit yvir málini, ið vísa, hvussu nógv skjøl eru í málunum...
> Tann 2. november 2023 almannakunngjørdi umboðsmaðurin eina kanning um viðgerð av málum um alment innlit í størru kommununum, herundir Vága kommunu, har umboðsmaðurin kannaði handfaringina av 10 daga regluni í innlitslógini.
> Í viðmerkingum umboðsmansins til Vága kommunu varð millum annað gjørt vart við, at kommunan eigur at upplýsa, hvussu nógv skjøl eru í málinum, og viðleggja skjalayvirlit, so borgarin sær, hvørt hann hevur fingið fult innlit ella ikki. Eisini varð gjørt vart við, at innlitsumbønir sum útgangsstøði skulu vera viðgjørdar og svaraðar innan 10 dagar. Um hetta ikki er gjørligt, skal borgarin hava svar innan 10 dagar um, hví innlitsumbønin ikki er viðgjørd innan 10 daga freistina. Hesar reglur um alment innlit eru eisini galdandi, tá talan er um partsinnlit eftir fyrisitingarlóg.
> Sambært frágreiðingini, hevði Vága kommuna ikki nakra skrivaða mannagongd fyri viðgerð av innlitsmálum, og mælti umboðsmaðurin tí Vága kommunu til at gera skrivliga mannagongd fyri viðgerð av innlitsmálum.
> Umboðsmaðurin ynskir tí at vita, um Vága kommuna hevur gjørt slíka mannagongd. Um so er, ynskir umboðsmaðurin av fáa avrit av mannagongdini..."

Tann 6. juni 2024 sendi Vága kommuna umboðsmanninum svar til uppfylgjandi spurningarnar, har millum annað stóð:

> "...
> Eg havi roynt at viðheft tey skjøl, tygum umbiðja.
> Tað er rætt, at tað stendur ikki, hvussu nógv skjøl eru í hvørjum máli..."

Viðløgd teldupostinum var millum annað soljóðandi mannagongd í sambandi við innlitsumbønir:

> "Mannagongd
> Umbønir um alment innlit
> 1. Umbøn um alment innlit kemur inn.
> 2. Umbønin verður journaliserað í 360 við kotuni 05 og fær eitt málsnr.
> 3. Málsviðgerðin viðger umbønina innan 10 yrkadagar og sendir svar til umsøkjara.
> - Í samband við játtan ella partvísa játtan verður innlitsmál upprættað.
> - Í samband við noktan ella partvísa noktan svarar málsviðgerin við kæruvegleiðing.

4. Svar uppá innlitsumbøn verður at skráseta í málið, har umbønin liggur."

Tann 12. juni 2024 kunnaði umboðsmaðurin, við skrivi, partarnar um, at farið varð nú undir endaligu viðgerðina av málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um vantandi svar frá Vága kommunu í sambandi við umbøn frá klagaranum um innlit í egið mál og um mannagongdina hjá Vága kommunu fyri viðgerð av innlitsumbønum.

Málsgongdin vísir, at klagarin, eftir at hava sent Vága kommunu innlitsumbøn í egið mál, tann 5. apríl 2024, ikki fekk innlit í málið fyrr enn tann 17. mai 2024. Hetta var sama dag, sum kommunan lat umboðsmanninum frágreiðing um málið, og var heili seks vikur eftir, at umbønin um innlit varð latin kommununi, og 11 dagar eftir, at klagan varð send kommununi til ummælis.

Í § 16, stk. 2 í innlitslógini (Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) er ásett, at myndugleikin sum skjótast skal gera av um ein áheitan um innlit kann vera gingin á møti. Um ein áheitan um skjalainnlit ikki er gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Hetta er eisini galdandi fyri § 16, stk. 2 í fyrisitingarlógini (Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) um avgerð í málum um partsinnlit.

Sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini og fyrisitingarlógini um avgerð í málum um skjalainnlit, hevur myndugleikin eina fráboðanarskyldu. Ásetingin hevur eisini sum fyritreyt, at myndugleikin beinanvegin snarkannar eina umbøn um innlit, soleiðis at myndugleikin skjótast gjørligt er førur fyri at gera sær eina meting av, hvussu málsviðgerðin skal handfarast, og hvussu drúgv málsviðgerðartíðin kann væntast at verða.

Fráboðanarskyldan, sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini og fyrisitingarlógini, er treytaleys. Tískil skal ein myndugleiki leggja síni viðurskifti soleiðis til rættis, at hann er førur fyri at geva eina rættstundis fráboðan um tey viðurskifti, ið gera at málsviðgerðin av einari innlitsumbøn verður seinkað.

Tann 2. november 2023 almannakunngjørdi umboðsmaðurin kanningina "Frágreiðing um viðgerð av málum um alment innlit í størru kommununum". Í frágreiðingini minti umboðsmaðurin Vága kommunu á lógarásettu krøvini til viðgerðartíð.

Eg haldi tað ikki vera nøktandi, at Vága kommuna ikki avgreiddi innlitsumbønina hjá klagaranum sum skjótast, sambært § 16, stk. 2 í fyrisitingarlógini, og heldur ikki kunnaði klagaran um, nær avgerðin kundi væntast, tá ið 10 dagar vóru farnir.

Í kanningini hjá umboðsmanninum frá november 2023 um viðgerð av málum um alment innlit í størru kommununum minti umboðsmaðurin eisini Vága kommunu á, at játtanarskriv eiga at sýna greitt, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í málinum og um innlit verður latið í tey øll. Umboðsmaðurin mælti í frágreiðingini eisini Vága kommunu til at gera skrivliga mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum. Hóast kanningin snúði seg um alment innlit eftir innlitslógini, so eru viðmerkingarnar eisini galdandi fyri partsinnlit eftir fyrisitingarlógini.

Vága kommuna hevur nú gjørt mannagongd fyri viðgerð av umbønum um alment innlit. Tað framgongur ikki av mannagongdini, at skjalayvirlit, ið vísir, hvussu nógv skjøl eru í málinum tilsamans, eigur at verða viðlagt, tá innlitsumbønir verða avgreiddar.

Í skjølunum sást, at skjalayvirlitið, ið klagarin fekk, ikki vísti, hvussu nógv skjøl vóru í málinum hjá klagaranum tilsamans.

Eg haldi tað ikki vera nøktandi, at Vága kommuna ikki lat klagaranum eitt skjalayvirlit, ið vísti, hvussu nógv skjøl eru í málinum tilsamans, so hann sá, hvørt hann hevði fingið fult innlit ella ikki. Eg fari at mæla Vága kommunu til at viðleggja skjalayvirlit, ið vísir, hvussu nógv skjøl eru í málinum tilsamans, tá innlitsumbønir verða avgreiddar, og at dagføra mannagongd sína í samsvari við hetta.

Í mannagongdini er ásett, at ein innlitsumbøn skal viðgerast innan 10 yrkadagar.

Hetta er ikki í samsvar við § 16, stk. 2 í innlitslógini og fyrisitingarlógini. Sambært innlitslógini og fyrisitingarlógini, skulu innlitsumbønir avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast. Teir 10 dagarnir eru fyri tað fyrsta ikki at skilja sum einans yrkadagar. Allir dagar telja við. Endamálið við ásetingunum í § 16 er, at innlitsumbønir eiga at verða viðgjørdar við einum serligum skjótleika og ikki uttan serliga orsøk taka longri tíð, enn neyðugt er. Mannagongdin hjá Vága kommunu sýnist byggja á ta fatan, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast innan 10 yrkadagar, og at kommunan kann bíða við at avgreiða hana til tá. Henda fatan er ikki í trá við lógina. 10 daga freistin er ikki ein freist fyri, nær málsviðgerðin skal vera liðug, men ein fráboðanarfreist, sum í sjálvum sær er ætlað at viðvirka til, at málsviðgerðin ikki uttan orsøk dregur út. At ein innlitsumbøn skal viðgerast sum skjótast skal skiljast bókstaviliga, og grundað á umstøðurnar og vavið á skjølunum í hesum málinum átti avgreiðslan í ítøkiliga førinum, eftir mínari meting, ikki at tikið meira enn nakrar dagar. Eg fari tí at mæla Vága kommunu til eisini at dagføra mannagongd sína í samsvari við hetta.

**Samanumtikið**

Samanumtikið fari eg at geva Vága kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum. Eg fari at mæla kommununi til at dagføra mannagongdina fyri viðgerð av innlitsumbønum, so tað framgongur av mannagongdini, at innlitsumbønir skulu svarast, sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal fráboðan um orsøkina sendast umsøkjaranum eins og boð um, nær ein avgerð kann væntast. Eisini eigur skjalayvirlit, ið vísir, hvussu nógv skjøl eru í málinum tilsamans, at verða viðlagt, tá ein innlitsumbøn verður avgreidd.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður